90 SEKUND

LAGT TIL RÆTTIS: Inna Törnroos

# SIGRIÐ RASMUSSEN

# Etur **lakres** og vaskar sær við Elida



**FAKTA SIGRIÐ**

**Navn:** Sigrið Rasmussen
**Aldur:** 17,5 x2
**Bústaður:** Aalborg
**Starv:** Tónleikari
**Familja:** upptikin

**Hvussu er lagið?**
Heilt gott

## Hvat ger teg glaða?
Tá onnur geva mær eitt smíl, og eg síggi at tað gongst væl hjá øðrum. Gott veður og góður tónleikur.

**Hvat ger teg illan?**
Órættvísi.

**Hvat er títt yndisgóðgæti?**
Lakres! Gott fyri magan.

**Hvat vil tú kallast – Sigrey ella Sigrid?**
Sigrið = ey er tað internationala ð:ið

## Er tú rík?
Tað kemur an uppá hvat man kallar ríkidømi. Í nógvum førum haldi eg at eg eri rík.

**Hvørjum listafólk hevur tú stóra virðing fyri?**
Øllum, sum kempa fyri sína list, havi eg stóra virðing fyri.

**Hvat slag av sjampoo brúkar tú?**
Elida. Bíligt og besta í verð.

**Fer tú nakrantíð at klippa tær stutt?**
Ja, tað kundi hent, um eg einaferð fór at skifta tónleikastíl.

**Hvat ert tú glaðast fyri við tær sjálvari?**
Síggi alt frá tí ljósu síðuni. Tá verða sjálvt tey keðiligu tingini lættari.

**Hvat er romantiskt?**
Stearinljós.

**Hvør er besta bók tú hevur lisið?**
Eg haldi meg ikki hava lisið hana enn.

## Mariah Carey ella Whitney Houston?
Mín fyrsta fløga var altso Whitney Houston, so hon hevur verið longst í mínum lívi.

**Hvør er tín lívrættur?**
Avgjørt føroyskur matur. Best er ræsta kjøtið, og so alt hitt sum fylgir við, men mær dámar ikki blóðpylsu.

## Hvat er største brølari sum er gjørdur í Foroyum?
At vit enn liva í skugganum av øðrum.

**Hvat hevði tú gjørt um tú var ósjónlig ein dag?**
Sitið undir liðini av einari leyvu

**Er tú bangin fyri at gerast gomul?**
Næ... um eg livi so leingi vóni eg, at eg verið ein cool og frísk eldri dama.

**Hvat hevur lívið lært teg?**
At vera takksom.